**Reyði krossur Føroya**

Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya
svarar mánad., mikud. og fríggjad.
frá kl. $19^{00}$ til $21^{00}$

☎ 212380

bobcat® -maskinurnar sum halda!

- Gravmaskinur *–nógv model*
- Lessarar við óteljandi møguleikum!

Vælegnaðar til byggi-
virkir, entrepenørar,
bøndir, jarðarbrúk o.a.

*Keyp góðsku – keyp Bob Cat!*



Sosialurin - 311820

**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

J|Ä|S|P|I **KETLAR**

***Teir væl-umtóktu ketlarnir***
*eru á goymslu*



**Bæði dupultir og einkultir**

Skulu tygum hava nýggjan
ketil, so tosið við okkum
og fáið eitt gott tilboð.
Vit hava serkøn fólk, ið geva
eina skjóta og góða tænastu.

**- Alt tilfar til hitaverk og sanitet fæst hjá okkum**

**MARIA POULSEN & CO**
Smyrilsvegur 8 - tlf. 312000



**Stóra bringu**
**-ella lítla?**

**Visti tú at 80% av øllum kvinnum ganga í skeivari BH-stødd?**

**Vælkomin inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa og vegleiða tær at finna júst tína stødd. Ring til okkum og avtala tíð.**

**Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm. í ummáli, og frá AA til H skál.**

**Vit hava eisini korsilett í stórum støddum**

siri liv & heilsa

Sosialurin - 311820

Dr. Jacobsensgøta 18 • 100 Tórshavn • Tel./Fax 316610

**Nýggjar TANNPROTESUR**

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16


# KUNNINGARFUNDUR UM E-BUSINESS

## fríggjadagin 1. september 2000 kl. 13.00 til uml. kl. 17.15 á Hotel Føroyum

Heimasíðu og teldupost kenna tey flestu í dag; men hetta er bert ein lítil partur av teim møguleikum, sum fylgja við alnetinum og tí elektronisku handilsverðini í dag og í framtíðini. So ella so eru møguleikarnir viðkomandi fyri allar fyritøkur, sum vilja tryggja sær framtíðar kappingarføri. Felagsheitið fyri hesar møguleikar er "e-business" - sum leiðslan á einstøku fyritøkum eigur at taka støðu til.

TK-Stovan skipar fyri kunningarfundi um e-business undir heitinum **"E-business – viðkemur øllum fyritøkum"**.
Kunningarfundurin er í tveimum pørtum. Í fyrra partinum verður framløga um e-business í síni heild, og seinna partinum eru fýra styttri innlegg um meira ítøkilig evnir, sum eru partur av e-business.

***Skráin verður í høvuðsheitum hendan:***

**13.00** TK-Stovan bjóðar vælkomin

**13.10** Fokus på digitalisering og e-business v/ Jesper Bove-Nielsen

**14.45** Steðgur

**15.00** Hvat kann gerast fyri at fyrireika og ráðgeva fyritøkum, um e-business (t.d. e-handil, e-marknaðarføring, e-keyp, e-distributión v.m.)
v/Preben Bach, TIC ráðgeva í Århus amt

**15.30** E-business í Føroyum í dag. Ein lýsing av, hvørjir møguleikar eru í Føroyum í dag, og hvat vit kunnu vænta í næstum.
v/ Niels Chr. Nolsøe, stjóra á Elektron

**16.00** Eimskip: Visión og málsetningar um e-business. Hvussu nýtir Eimskip hesa nýggju tøknina, og hvussu fara viðskiftafólk at merkja e-business?
v/ Linda Gunnlaugsdóttir, stjóra á Eimskip Føroyar

**16.30** Greitt verður frá tí partinum av e-handli, sum fevnir um flutning av kunning og peningi. Dentur verður lagdur á at greiða frá, hvat skal til, tá ið slíkar loysnir skulu fremjast, bæði av útvegara og keypara. Komið verður stutt inn á tekniska partin og kostnaðarstøðið.
v/ Fróða Magnussen, deildarleiðara á Formula.fo

**17.00** Møguleiki at seta spurningar til allar fyrilestrahaldararnar.

**Tilmelding: TK-Stovan, fax 31 93 63 tel. 31 73 66 ella teldupost: tk@tk.fo**
**Kostnaður: Kr. 400,00 u/ MVG.**
**Tilmelding í seinasta lagi týsdagin tann 29/8-2000 áðrenn kl. 12.00.**
**Tilmeldingin er bindandi.**

**TK-STOVAN**
Niels Finsensgøta 37
100 Tórshavn
Tel. 31 73 66 • Fax 31 93 63

Sosialurin - 311820

**Kunningarfundur um E-business**

Virkisnavn:.........................................................Tal av luttakarum:.....................

Bústaður:..........................................................................................................

Tel.:.......................................................Fax.:......................................................


*Allir* **prentlutir í góðum hondum** *hjá*

Spf. **HESTPRENT**
Dvørgastígur 7 • 100 Tórshavn
Tlf. 31 45 55 • Fax. 31 80 26
e-mail: hestoy@hestprent.fo

**Lesið sosialin sosialin sosialin sosialin -tað loysir seg**

Sosialurin - 311820


**Fáa tit ikki blaðið leygardagar?**

Vinarliga ring tel. 214118, um tú sum haldari ikki fært leygardagssosialin. Boðar tú ikki frá innan kl. 15.00 leygardag, hava vit ikki møguleika fyri at bera leygardagsblaðið út.

Tíðindablaðið sosialurin




**GRAVSTEINAR OG KANTSTEINAR.**
**NÚ EISINI ÚR FØROYSKUM GRÓTI**

**Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið**

**Til útisetar í Danmark**
**Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað**

**Danstein**
Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

**Skjót levering**

**Tel. 318323**
**Tel. 447512**
**Tel. 217512**
**Fax 449961**

Sosialurin - 311820

RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN www.danstein.fo




## Frá 1000 ára haldinum

Sunnudagin 27. august kl. 16.00 heldur Johs. Andr. Næs fyrilestur um kristniundirvísing í skúlaverkinum í kirkjuni í Hósvík.

FØROYAR KRISTNAR Í 1000 ÁR
Postboks 1121 · tlf. +298 321132 · fax +298 321761 · FO-110 Tórshavn

## Íbúð ella kamar

Almannastovan søkir eftir íbúð ella kamari til eitt av viðskiftafólkum okkara skjótast til ber í Klaksvík ella Suðurstreymoy. Leigan verður goldin beinleiðis til útleigaran. Um hetta hevur tín áhuga, vinarliga send skriv til:

Bill. mrk. 161
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

## Bakarasveinur

Søkt verður eftir bakara at byrja í september.

Vit vænta, at tú ert álítandi, fyrikomandi og kanst arbeiða sjálvstøðugt.

Vit bjóða lagaligar arbeiðstíðir við 4 daga arbeiðsviku og fasta løn v.m. eftir avtalu.

Meira fæst at vita um starvið við at spyrja eftir Meinhard á tlf. 44 12 03 ella 31 05 92.

Umsókn kann sendast til:

**Bakaríið á Skála**
480 Skála


## Frimærker Breve – Postkort

## Gratis vurdering

Thomas Høiland Auktioner A/S kommer til Færøerne.

**Fredag 25. august, 2000**
**Kl. 10–12**
**Hotel Hafnia, Torshavn**

Tag Deres frimærker med og få en gratis vurdering. De kan også indlevere til vor internationale auktion i november 2000. Kontakt venligst Thorolf Björklund for yderligere oplysninger.
Telefon: 31 36 31.

**Thomas Høiland Auktioner A/S**
**Frimærker & Mønter**
Frydendalsvej 27 • DK-1809 Frederiksberg C
Tlf. +45 3386 2424 • Mønter +45 3386 2428 • Fax +45 3386 2425
Giro 998 3171 • e-mail: hoiland@hoiland-stamps.dk

*Lýsið í* **sosialinum**


## Svimihylurin á Oyrarbakka

Opið er:
Fríggjadag kl. 16–20 (bert vaksin kl. 19–20)
Leygardag kl. 10–12

## Barnagarðurin á Teiginum søkir eftir fólki

Sands Bygdarráð hevur sett á stovn ein dagstovn til børn í Sands Kommunu í aldrinum 0–9 ár. Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur, sum hevur pláss fyri 10 vøggustovubørnum og 20 barnagarðsbørnum.

Væntandi verður stovnurin klárur at taka ímóti børnum tann 01. oktober 2000.

**Vit sóknast eftir:**

2 pedagogum 35 tímar um vikuna
2 pedagogum 30 tímar um vikuna
1 pedagogi 20 tímar um vikuna
1 hjálparfólki 30 tímar um vikuna
1 hjálparfólki 20 tímar um vikuna.

Um ikki nokk av pedagogum søkja, verða hjálparfólk sett í staðin.

**Krøv til umsøkjararnar:**

– at tú ert fleksibul
– opin og erligur
– dugir at síggja møguleikar
– hevur góð samarbeiðsevnir.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

**Søkt verður eisini eftir:**

1 reingerðingsfólki umleið 15 tímar um vikuna.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til leiðaran, **Randi í Soylu Joensen, tlf. 214649.**

Umsóknir saman við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu sendast til Sands Bygdarráð, 210 Sandi, viðmerkt »umsókn til barnagarðin« í seinasta lagi 11. september 2000.

**Nevndin fyri Sjálvsognarstovnin**

## Reingerðarfólk

Lýst verður eftir fólki at vaska frítíðarskúlan í Trongisvági tveir tímar um dagin mánadag-fríggjadag.

Freistin at senda umsókn inn er 29. august 2000.

Umsóknir skulu sendast til:

**Frítíðarskúlan**
c/o Tvøroyrar kommuna
Postboks 80
800 Tvøroyri


# ÚTSØLA

**Hósdagin 24. aug. byrjar summarútsølan av meturvørum við**

**50% og 30% í avsláttri**

**og nógvum góðum niðursettum restum**

**Kom inn og ger eitt gott keyp!**

**SP/F MARJUN HEIMÁ**
C. Ployensgøta 4 • 100 Tórshavn
Tel. 31 25 31 • Fax 31 23 19


## Dansifrøi

## Hugnakvøld

**Týsdagin 29. august** fáa vit vitjan úr Danmark av Grethe Bach og einum seniorholdi. Dansað verður í auluni í Hoydølum, har vit m.a. fara at sýna fram onkrar av okkara dansum og tey fara at dansa seniordans. **Byrjað verður kl. 20.00**

Kaffi/te og køkur verða at fáa. Kostnaður kr. 50,-

**Møtið fjølment.** Við dansikvøðu.

**NEVNDIN**

## Hjálparfólk

Søkt verður eftir avloysara fyri hjálparfólk til 39 ára gamlan lammaðan mann.

Arbeiðið verður gjørt í samstarvi við mannin og Almannastovuna.

Ynskiligt er, at tann, ið settur verður, hevur hóskandi fakliga útbúgving og/ella royndir frá líknandi arbeiði, og ikki er yngri enn 25 ár. Neyðugt er at hava koyrikort.

Setanartíðin er frá 15. september 2000 til 31. juli 2001. Arbeiðstíðin er 36 tímar um vikuna og verður arbeitt í skiftandi vaktum.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 8. september 2000. Umsóknir skulu vísa til j.nr. 1999-02/1428 og skulu sendast til:

**Almannastovan**
Postsmoga 3096
110 Tórshavn
Stílað: Minna Jacobsen

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Minnu Jacobsen á tlf. 315480 millum kl. 9 og 13, tó ikki mikudag.